Havnar Klubbi • Tinghúsvegur 8 • 100 Tórshavn • Tel 31 15 52 • klubbin@klubbin.fo • klubbin.fo

# Kunning um umvælingar og summarskrá í Havnar Klubba.

## Skift av klædningi

Í sambandi við arbeiðið at skifta klædningin á bygninginum hava vit tíverri staðfest, at útveggurin er í nógv verri standi, enn nakar hevði roknað við.

Tá vindpláturnar innan fyri klædningin vórðu tiknar niður, kom fram, at ein stórur partur av berandi konstruktiónsviðinum er rotin. Støðan er so álvarslig, at partar av konstruktiónini duttu niður av sær sjálvum, meðan aðrir partar hingu leysir.

Ráðgevi okkara í verkætlanini, Bergur Rask Olsen, mælir tí staðiliga til, at allur veggurin verður tikin niður og bygdur upp av nýggjum, soleiðis at arbeiðið verður gjørt á tryggan og haldgóðan hátt.

Leystliga metingin frá Valaverk vísir, at henda eyka uppgávan væntandi fer at kosta millum 500.000 og 700.000 krónur aftrat upprunaliga tilboðnum, sum er umleið 1 mió. krónur. Tilfarið til nýggja uppbyggingina er mett at kosta millum 100.000 og 120.000 krónur. Harumframt koma útreiðslur til rørarbeiði, elarbeiði og málaraarbeiði.

Hetta er ein óvæntað, men neyðug íløga fyri at tryggja bygningin nógv ár fram í tíðina.

## Nýtt gólv í Klubbanum

Gólvið í Klubbanum, teppið er sera illa farið, og tað hevur leingi verið greitt, at tað má skiftast.

Samstundis eru krøvini til reinføri og reingerð herd, og tí hevur nevndin valt, at leggja á, eitt nýtt, slitsterkt og vaskivinarligt gólv.

Arbeiðið byrjar mánadagin 5. juli og verður væntandi liðugt eftir umleið fimm arbeiðsdagar.

## Summarskráin 2026

Summarskráin er nakað broytt í ár samanborið við undanfarin ár, **sí** mánaðarbræv fyri juli 2026.

Vanliga hevur dansurin hildið fram til síðsta vikuskiftið í mai. Síðani hevur Klubbin verið stongdur fram til Ólavsøku, har opið hevur verið 28. og 29. juli. Eftir Ólavsøku hevur aftur verið stongt fram til Ovastevnu, tá vanliga dansiskráin byrjar aftur.

Í fjør helt barrin opið alt summarið, tó uttan fasta undirhalds- ella aktivitetsskrá.

Í ár valdu vit at leingja dansiskránna við trimum eyka vikuskiftum, áðrenn farið varð yvir til summarskránna.

## Í summar, verður:

- Náttarklubbi hvørt fríggjakvøld.
- KlubbaQuiz hvørt leygarkvøld, við Náttarklubba aftaná.

Nevndin vónar, at limirnir taka væl ímóti bæði umvælingunum og nýggju summarskránni, og vit gleða okkum at bjóða tykkum vælkomnum í Klubban alt summarið.

---

Við klubbakvøðu
NEVNDIN

Heimir Ottóson    Nemus N. Djurhuus    Jens Mortan Rasmussen    Óskar Eiriksson    Petur Øster

Havnar Klubbi • Tinghúsvegur 8 • 100 Tórshavn • Tel 31 15 52 • klubbin@klubbin.fo • klubbin.fo

2. juli 2026

# Mánaðarbræv - juli 2026

❖

Fríggjakvøldið 3. juli
Fimmari kl. 17.00
Náttarklubbin: frá kl. 23.00 – 03.45

— ❖ —

Leygarkvøldið 4. juli
KlubbaKviss: Kristian Joensen kl. 21,30 – 23,30
Náttarklubbin frá kl. 23.30 – 03,45

— ❖ —

Fríggjakvøldið 10. juli
Fimmari kl. 17.00
Náttarklubbin: frá kl. 23,00 – 03,45

— ❖ —

Leygarkvøldið 11. juli
KlubbaKviss: Niels Petersen kl. 21,30 – 23,30
Náttarklubbin frá kl. 23.30 – 03,45

— ❖ —

Fríggjakvøldið 17. juli
Fimmari kl. 17.00
Náttarklubbin: frá kl. 23,00 – 03.45

— ❖ —

Leygarkvøldið 18. juli
KlubbaKviss: Niels Petersen frá kl. 21.30 – 23,30
Náttarklubbin frá kl. 23.30 – 03,45

— ❖ —

Fríggjakvøldið 24. Juli
Fimmari kl. 17.00
Náttarklubbin: Frá kl. 23,00 – 03.45

— ❖ —

Leygarkvøldið 25. juli
KlubbaKviss: Fróði R. petersen frá kl. 21,30 – 23,30
Náttarklubbin frá kl. 23.30 – 03,45

— ❖ —

Ólavsøkuaftan 28. Juli
Fimmari kl. 17.00
Dansur við Sommer Son Band: Frá kl. 23,30 – 03.45

— ❖ —

Ólavsøka 29. juli
Vælkomin í Klubban frá kl. 21.00 – 03,45

— ❖ —

Fríggjakvøldið 31. Juli
Fimmari kl. 17.00
Náttarklubbin: Frá kl. 23,00 – 03.45

❖❖❖

Nevndin ynskir øllum limum í Havnar Klubba, familjum teirra og avvarðandi eitt framhaldandi gott summar.

---

Við klubbakvøðu
NEVNDIN

Heimir Ottóson | Nemus N. Djurhuus | Jens Mortan Rasmussen | Óskar Eiriksson | Petur Øster